NUMO

# Róðrarsamband Føroya
# 100 Tórshavn

# Ársroknskapur fyri 2022

**Innihaldsyvirlit** **Síða**


| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 2 |
| Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara | 3 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Ársroknskapurin hjá Róðrarsamband Føroya fyri 2022 er góðkendur av nevndini.

Ársroknskapurin er gjørdur sambært vanligum reglum um góðan roknskaparsið, umframt eftir "Kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan."

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skyldum, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Ársroknskapurin verður hervið lagdur fyri aðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, hin 14.03.2023

| | | |
|---|---|---|
| Annika Dalsgarð, forkvinna | Elsa Magnussen | Rógvi Kærbech |
| Jakup Joensen | Hugo Skorastein | Petur Hansen |

fundarstjóri

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

*Til nevndina í Róðrarsamband Føroya*

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Róðrarsamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur sambært vanligum reglum um góðan roknskaparsið, umframt eftir "Kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember 2022 og úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2022 samsvarandi vanligum roknskaparreglum.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum".Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøða.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og aðrar ásetingar í

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

føroysku grannskoðaralógini, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

Tórshavn, hin 14.03.2023

**NUMO**
Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Heini Mortensen
*skrásettur grannskoðari*

## Nýttur rokninskaparháttur

Ársroknskapurin er uppsettur sambært § 21, stk. 2 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan, umframt eftir vanligum reglum um góðan roknskaparsið.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar í stigum, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavnan av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, herundir av og niðurskrivingar innroknaðar.

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.
Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.
Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**
Inntøkur er allur stuðul, luttøkugjøld, søla v.m. í árinum.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður er lønir, samsýningar, frítíðarlønir, eftirlønir og almenn lønargjøld.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verða rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og rentukostnaður.

## Nýttur roknskaparháttur

### Fíggjarstøða

**Materiell støðisogn**

Materiell støðisogn verður upptikin til útveganarvirði við frádrátti fyri samlaðum avskrivingum. Ella til endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella sølu.

Útveganarvirði eru kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at íløguni fram til, tá ið ognin verður tikin í nýtslu. Útvegnarvirði fyri eina samlaða íløguogn verður býtt í ognarlutir, ið verða avskrivaðir hvør sær, um brúkstíðin av hvørjum ognarluti sær ymisk.

Avskrivingar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og ásett restvirði og verða gjørdar við eins upphæddum hvørt ár. Tilgongdir í árinum verða avskrivaðar frá keypsmánaða. Felagið hevur ásett hesar brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Tøknilig útgerð | 3-5 | 2% |
| Startlína | 15 | 2% |

Vinningur ella tap við sølu av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprís, frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virði søludagin og rakstrarført undir avskrivingar.

**Áogn**

Áogn verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving móti tapi.

**Tøkur peningur**

Peningur er tøkur kassa- og innlánspeningur.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, roknaðar undir skuld, fevna um inngjøld frá feløgum í stevnugrunnin, ið verða útgoldin úr grunninum árið eftir.

**Skuld**

Øll stuttfreistað skuld er tikin við til amortiserað útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virði.

**Rakstarroknskapur 1. januar - 31. desember 2022**

| | Nota | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | 1 | 1.066.245 | 1.101.704 |
| Vørunýtlsa | 2 | -38.745 | -272.408 |
| Landsliðsútreiðslur | 3 | -17.303 | -38.202 |
| Útreiðslur land- og FM kappingin | 4 | -313.231 | -330.228 |
| Útreiðslur til altjóða fundir | 5 | -115 | -16.571 |
| Felagskostnaður | 6 | -193.909 | -130.799 |
| Útreiðslur til skeið | 7 | -14.672 | -1.200 |
| Fyristingarkostnaður | 8 | -56.686 | -92.612 |
| Starvfólkakostnaður | 9 | -498.244 | -415.685 |
| Av- og niðurskrivignar | 10 | -112.661 | -171.109 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **-179.322** | **-367.109** |
| | | | |
| Aðrar fíggjarligar útreiðslur | | -3.798 | -2.525 |
| **Úrslit áðrenn skat** | | **-183.120** | **-369.635** |
| | | | |
| **Ársúrslit** | | **-183.120** | **-369.635** |

**Fíggjarstøða pr. 31.12.2022**

| Ogn | Nota | 31.12.2022 | 31.12.2021 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Tøkniligur útbúnaður | | 372.294 | 445.239 |
| Startlína | | 10.086 | 12.874 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | 10 | **382.380** | **458.113** |
| Áogn av sølu og tænastum | | 7.500 | 4.570 |
| Onnur áogn | | 20.733 | 23.226 |
| **Áogn tilsamans** | | **28.233** | **27.796** |
| Betri rakstarkonta 185.097.2 | | 27.179 | 127.627 |
| Betri stevnugrunnur | | 210.592 | 156.415 |
| Betri visa 404.227.3 | | 3.088 | 13.190 |
| Betri 558.786.9 | | 2.165 | 9.983 |
| Kassapeningur | | 1.606 | 1.606 |
| **Tøkur peningur tilsamans** | | **244.630** | **308.821** |
| **Ogn í umferð tilsamans tilsamans** | | **272.863** | **336.616** |
| **Ogn tilsamans** | | **655.242** | **794.729** |

**Fíggjarstøða pr. 31.12.2022**

| **Skyldur** | Nota | 31.12.2022<br>kr. | 31.12.2021<br>kr. |
|---|---|---|---|
| Fluttur vinningur | | 612.700 | 982.334 |
| Ársúrslit | | -183.120 | -369.635 |
| **Eginogn tilsamans** | | **429.579** | **612.700** |
| Vøru- og tænastuskuld | | 14.571 | 13.455 |
| Onnur skuld | | 0 | 12.159 |
| Tíðaravmarking (stevnugrunnur) | 11 | 211.091 | 156.415 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **225.662** | **182.029** |
| **Skuld tilsamans** | | **225.662** | **182.029** |
| **Skyldur tilsamans** | | **655.242** | **794.729** |

## Notur

| | | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| 1 | **Inntøkur** | | |
| | Landskassastudningur frá ÍSF | 692.123 | 690.323 |
| | Luttøkugjald | 66.215 | 57.350 |
| | Aðrir sponsorar | 50.000 | 197.360 |
| | Inntøkur "klagugjøld" | 500 | 1.000 |
| | Aðrar inntøkur | 88.361 | 83.373 |
| | Inntøkur "lýsingar" | 98.000 | 24.080 |
| | Inngjald fyri høvuðsdómara | 52.500 | 37.500 |
| | Inntøka av viðlíkahald startur | 18.546 | 10.718 |
| | | **1.066.245** | **1.101.704** |
| 2 | **Vørunýtsla** | | |
| | Vørunýtsla | -38.745 | -272.408 |
| | | **-38.745** | **-272.408** |
| 3 | **Landsliðútreiðslur** | | |
| | Ferðakostnaður til og í útlandinum | -650 | 0 |
| | Uppihald í útlandinum | -2.048 | 0 |
| | Búnar o.l. | 0 | -23.617 |
| | Kostur í útlandinum | -2.247 | -1.404 |
| | Leiga av vøllum / hølum | 0 | 0 |
| | Útgerð inniróður | -12.358 | -10.891 |
| | Annað | 0 | -2.290 |
| | | **-17.303** | **-38.202** |
| 4 | **Útreiðslur til lands- og FM-kapping** | | |
| | Ferðakostnaður | -949 | -980 |
| | Uppihald | -7.774 | -19.568 |
| | Heiðursmerkir | -42.734 | -47.257 |
| | Búnar o.l. | -3.179 | -1.205 |
| | Ítróttaútgerð/viðlíkahald og leiga av útgerð | -233.810 | -226.773 |
| | Útreiðslur vørubilur og vognur | -20.642 | -22.685 |
| | Inniróður | -3.523 | -11.617 |
| | Ódnartak | -620 | -144 |
| | Víðarasøla ella sponsorar | 0 | 0 |
| | | **-313.231** | **-330.228** |

## Notur

| | | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| 5 | **Útreiðslur til altjóða fundir** | | |
| | Ferðakostnaður | 0 | -8.645 |
| | Uppihald | 0 | -4.936 |
| | Annað | -115 | -2.990 |
| | | **-115** | **-16.571** |
| 6 | **Felagskostnaður** | | |
| | Ferðakostnaður | 0 | -150 |
| | Útgerð | -263 | 0 |
| | Fundarútreiðslur | -44.518 | -27.246 |
| | Umboðan | -1.400 | 0 |
| | Gávur og graveringar | -27.939 | -14.658 |
| | Starvsnevndarfundir | -5.765 | 0 |
| | Limagjøld | -2.500 | 0 |
| | Tryggingar | -10.987 | -1.277 |
| | Klæðir - búnar | -5.310 | -8.117 |
| | Dómarakostnaður | 0 | -5.880 |
| | Heimasíða og útreiðslur til sosialar miðlar | -36.612 | -12.330 |
| | Hølisleiga og annað | -58.615 | -61.140 |
| | | **-193.909** | **-130.799** |
| 7 | **Útreiðslur til skeið** | | |
| | Kostnaður fyri skeiðshaldara | -5.000 | -1.200 |
| | Ferðing og koyring | 0 | 0 |
| | Annað | -9.672 | 0 |
| | | **-14.672** | **-1.200** |

## Notur

| | | 2022<br>kr. | 2021<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **8** | **Fyrisitingarkostnaður** | | |
| | Tryggingar av útgerð og bili | -8.212 | -12.282 |
| | Telefon, fax og internet | -11.301 | -10.129 |
| | Bókhald | -16.989 | -22.717 |
| | Grannskoðan | -17.397 | -17.059 |
| | Aðrar útreiðslur | -2.596 | -25.040 |
| | Postgjald | 0 | -34 |
| | Ráðgeving og sakførarakostnaður | 0 | -1.025 |
| | Tól, teldur o.a. | -191 | -4.326 |
| | | **-56.686** | **-92.612** |
| **9** | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Løn til dómarar | -66.000 | -72.000 |
| | Løn til venjarar og hjálparfólk v.m. | -81.985 | -71.300 |
| | Løn til fyrisiting | -329.040 | -254.883 |
| | ALS, Barsilsgjald v.m. | -21.219 | -17.502 |
| | | **-498.244** | **-415.685** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **10** | **Materiell støðisogn** | Startlína | Tøkniligur útbúnaður |
| | Útveganarvirði, primo | 218.573 | 1.539.215 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 75.672 |
| | Frágongd í árinum | 0 | -75.230 |
| | Útveganarvirði, ultimo | 218.573 | 1.539.657 |
| | Avskrivað, primo | -205.699 | -1.093.976 |
| | Avskrivað í árinum | -2.788 | -109.872 |
| | Afturførdar avskrivingar ísv. sølu | 0 | 36.485 |
| | Avskrivað, ultimo | -208.487 | -1.167.363 |
| | **Virði 31.12.2022** | **10.086** | **372.294** |

**Notur**

| | | 2022<br>kr. | 2021<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 11 | **Stevnugrunnur** | | |
| | Skuld, primo | 156.415 | 146.663 |
| | Útgjald úr grunninum | -156.415 | -146.968 |
| | Inngjald í grunnin | 211.091 | 156.720 |
| | **Skuld, ultimo** | **211.091** | **156.415** |